Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Dagfesting: 7. mars 2024
Mál nr.: 24/06954
Málsviðgjørt: AP

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	§ 1 Í løgtingslóg um ferðslu, sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við § 30 í løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verða gjørdar hesar broytingar:
	1. Sum stytt heiti á løgtingslógini verður sett: **"(Ferðslulógin)"**
§ 2, stórt rómartal V. "**Bulvognur:** Motordrivið akfar ella uppí tað koplað akfar, sum hevur vekt, átrýst, støddella aðra tilgerð, ið forðar akfarinum skráseting, og sum er ætlað til flutning av serstakliga tungari ella rúgvismiklari vøru. **Lítil breytmotorsúkkla (pocketbike):** Motordrivið akfar á tveimum hjólum, sum hevur støddella útgerð, ið forðar akfarinum at verða góðkent til skráseting, og sum er minni enn 150 cm til longdar."	**2.** § 2, stórt rómartal III, litra C verður orðað soleiðis: "**C. Motoramboð**: Motordrivið akfar, sum í høvuðsheitum er útgjørt sum arbeiðsamboð og gjørt til at koyra í mesta lagi 40 km/t. Motordrivið akfar, sum er ætlað at skula stýrast av persóni til gongu, er eisini at skilja sum motoramboð."

§ 2, stórt rómartal V. "**Bulvognur:** Motordrivið akfar ella uppí tað koplað akfar, sum hevur vekt, átrýst, stødd ella aðra tilgerð, ið forðar akfarinum skráseting, og sum er ætlað til flutning av serstakliga tungari ella rúgvismiklari vøru. **Lítil breytmotorsúkkla (pocketbike):** Motordrivið akfar á tveimum hjólum, sum hevur stødd, tilgerð ella útgerð, ið forðar akfarinum at verða góðkent til skráseting, og sum er minni enn 150 cm til longdar."	**3.** Í § 2, stórt rómartal V, verður í øðrum reglubroti orðið "**(pocketbike)**" strikað.
§ 2, stórt rómartal V. "**Bulvognur:** Motordrivið akfar ella uppí tað koplað akfar, sum hevur vekt, átrýst, stødd ella aðra tilgerð, ið forðar akfarinum skráseting, og sum er ætlað til flutning av serstakliga tungari ella rúgvismiklari vøru. **Lítil breytmotorsúkkla (pocketbike):** Motordrivið akfar á tveimum hjólum, sum hevur stødd, tilgerð ella útgerð, ið forðar akfarinum at verða góðkent til skráseting, og sum er minni enn 150 cm til longdar."	**4.** Í § 2, stórt rómartal V, verður sum triðja reglubrot sett: "**Annað lítið motordrivið akfar:** Motordrivið akfar á einum hjóli ella fleiri hjólum, sum hevur stødd, tilgerð ella útgerð, ið forðar akfarinum at verða góðkent til skráseting."
	5. Í § 13 verður sum stk. 5 sett: "*Stk. 5.* Eftirlit hjá løgregluni sambært hesi løgtingslóg kann verða framt við beinleiðis atgongd til elektroniskar upplýsingar í koyrikortskránni, sum er grundarlag undir eftirlitinum."
Yvirskriftin yvir § 16 b: *"Brúk av fartelefon og øðrum teleútbúnaði"*	**6.** Yvirskriftin yvir § 16 b verður orðað soleiðis: *"Nýtsla av handhildnari teleútgerð og øðrum handhildnum samskiftistólum"*
§ 16 b. Førari av akfari má ikki, meðan hann koyrir, brúka handhildna fartelefon. *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um nýtslu av øðrum teleútbúnaði ella líknandi koyring.	**7.** § 16 b verður orðað soleiðis: "**§ 16 b.** Førari av akfari má ikki, meðan hann koyrir, nýta handhildna teleútgerð og onnur handhildin samskiftistól, sbr. tó stk. 2-4. *Stk. 2.* Ásetingarnar í stk. 1 eru ikki galdandi fyri nýtsluna av handhildnari mikrofon, sum hevur samband við samskiftisútgerð hjá løgregluni, um nýtslan er neyðug orsakað av arbeiðsuppgávum hjá løgregluni. *Stk. 3.* Ásetingarnar í stk. 1 eru ikki galdandi fyri nýtslu av handhildnari

	mikrofon, sum hevur samband við ísetta teleútgerð í akførum hjá tilbúgvingunum, bjargingarliðunum, sjúkraflutningstænastunum ella vegamyndugleikunum, um nýtslan er neyðug orsakað av arbeiðsuppgávum hjá eindunum. Sama er galdandi fyri nýtsluna hjá vinnuførarum av handhildnari mikrofon, sum hevur samband við ísetta teleútgerð í akfarinum, um nýtslan er neyðug orsakað av vinnuligum flutningi. *Stk. 4.* Ásetingarnar í stk. 1 eru ikki galdandi fyri nýtsluna av handhildnari mikrofon hjá koyrilærarum og prógdómarum, um nýtslan er neyðug fyri koyrifrálæruna og prógdømingina til lítið prutl, stórt prutl, motorsúkklu, traktor ella motoramboð.”
§ 18 c. ... *Stk. 2. ...* *Stk. 3, 2. pkt.* Er persónur frádømdur koyrirættin treytaleyst orsakað av rúsdrekkakoyring, kann hann, tá ið frádømutíðin er umliðin, einans afturvinna koyrirættin aftaná at hava luttikið í skeiði í rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeiði), og tá ein eftiransandi koyriroynd er staðin. Koyriroyndin kann verða tikin, áðrenn frátøkutíðin er úti. *Stk. 4-6. ...*	**8.** Í § 18 c, stk. 3, 2. pkt. verður “rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeiði)” broytt til: “rúsdrekka, rúsevni og ferðslu, RRF-skeiði”.
§ 18 c. ... *Stk. 2. ...* *Stk. 3, 6. pkt.* Hóast ein koyriroynd er staðin, skal hin dømdi hava luttikið í R/F-skeiði. *Stk. 4-6. ...*	**9.** § 18 c, stk. 3, 6. pkt. verður orðað soleiðis: “Hóast ein koyriroynd er staðin, skal hin dømdi hava luttikið á skeiði um rúsdrekka, rúsevni og ferðslu, RRF-skeiði.”
§ 18 c. ... *Stk. 2-4. ...* *Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetur reglur um innihaldið í koyrifrálæruni og um fremjingina av R/F-skeiðunum í sambandi við endurvinning av koyrirættinum aftaná eina treytaleysa ella treytaða frádøming, og um eftiransandi koyriroynd, herundir um afturtøku av koyrirættinum sbrt. stk. 4.	**10.** Í § 18 c, stk. 5 verður “R/F-skeiðunum” broytt til: “skeiði um rúsdrekka, rúsevni og ferðslu, RRF-skeiði”.

§ 18 d. ... *Stk. 2.* Er koyriforboð givið eftir § 59 h fyri tilburðir, sum eru umfatað av § 59 a, stk. 1, nr. 2, kann førarin einans fáa koyrirættin aftur, um hesin frammanundan hevur luttikið í einum R/F-skeiði og hevur staðið eina eftiransandi koyriroynd. *Stk. 3-5.* ...	**11.** Í § 18 d, stk. 2 verður "R/F-skeiði" broytt til: "skeiði um rúsdrekka, rúsevni og ferðslu, RRF-skeiði".
§ 18 d. ... *Stk. 2-3.* ... *Stk. 4.* Serlig koyrifrálæra ella R/F-skeið skal verða gjøgnumført og eftiransandi koyriroynd verða staðin, uttan mun til, um dømdi hevur staðið eina koyriroynd eftir tí tilburði, sum varð orsøk til koyriforboðið ella treytaleysu frádømingina. *Stk. 5.* ...	**12.** Í § 18 d, stk. 4 verður "R/F-skeið" broytt til: "skeið í rúsdrekka, rúsevni og ferðslu, RRF-skeiði".
§ 58 a, stk. 1, nr. 1. Við sekt verður tann revsaður, sum 1) brýtur § 4, § 11, stk. 1, § 11 a, § 12, § 14, § 16, stk. 4-5, § 16 b, stk. 1, § 17, § 18 c, stk. 2 og stk. 6, § 19, stk. 1-3, § 19 b, stk. 4, § 20, §§ 23-24, § 25, stk. 2, stk. 4, pkt. 2-3, stk. 5 og stk. 6, § 26, stk. 2-3, §§ 27-28, § 29, stk. 1-3 og stk. 5, §§ 29 a-e, § 30, §§ 30 a-c, § 31, §§ 31 a-e, § 32, stk. 1-7, § 32 a, § 33, § 33 a, §§ 34-35, § 35 a, stk. 1, § 35 b, stk. 1, § 35 c, § 36, stk. 1-4, § 36 b, § 37, stk. 2, § 39, stk. 1-2, § 40, stk. 1, § 41, § 42, stk. 1 og 4, § 42 a, stk. 6, § 42 b, stk. 4, § 42 c, stk. 1-2, §§ 43-46, § 46 b, § 48, stk. 4, § 49, § 51, § 53, § 55, § 60 a og § 62, stk. 4. Nr. 2-4. … *Stk. 2-12.* ...	**13.** Í § 58 a, stk. 1, nr. 1 verður aftaná "§ 60 a" sett: ", § 60 b".
§ 58 a. ... *Stk. 2.* Við áseting av sekt fyri brot á § 4, § 16, stk. 4 og 5, § 17, § 19, stk. 1-3, § 24, stk. 1, § 28, § 29, stk. 1-2, § 29 a, stk. 1-4, § 29 b, § 29 c, stk. 1, §§ 29 d-e, § 30, § 31, §§ 31 a-e, § § 32, § 32 a, § 33, § 33 a, §§ 34-35, §§ 35 a-c og §§ 36, stk. 1-3, § 36 b, § 37, stk. 2, § 39, stk. 1-2, § 42, stk. 1 og stk. 6, § 42 a, stk. 1-2, §§ 43-45 og § 45 a, stk. 2-3, verður ásett ein herd sekt. *Stk. 3-12.* ...	**14.** Í § 58 a, stk. 2 verður aftan á "16, stk. 4 og 5" sett: "§ 16 b, stk. 1,".

§ 58 a. ... *Stk. 2.* Við áseting av sekt fyri brot á § 4, § 16, stk. 4 og 5, § 17, § 19, stk. 1-3, § 24, stk. 1, § 28, § 29, stk. 1-2, § 29 a, stk. 1-4, § 29 b, § 29 c, stk. 1, §§ 29 d-e, § 30, § 31, §§ 31 a-e, § § 32, § 32 a, § 33, § 33 a, §§ 34-35, §§ 35 a-c og §§ 36, stk. 1-3, § 36 b, § 37, stk. 2, § 39, stk. 1-2, § 42, stk. 1 og stk. 6, § 42 a, stk. 1-2, §§ 43-45 og § 45 a, stk. 2-3, verður ásett ein herd sekt. *Stk. 3-12.* ...	**15.** Í § 58 a, stk. 2 verður "§§ 36, stk. 1-3," broytt til: "§ 36, stk. 1-4,".
	16. Í § 58 a verður sum stk. 13 sett: "*Stk. 13.* Fyri brot á § 60 b, stk. 1, verður ein herd sekt áløgd eigara ella útleigara av øðrum lítlum motordrivnum akførum."
§ 58 f. Málini verða viðgjørd sum løgreglumál, smbr. tó stk. 2. *Stk. 2.* Er málið um eitt brot, ið kann hava við sær, at frádøming av koyrirættinum kemur upp á tal, verður málið, um tað ikki kann verða avgreitt við samtykki eftir § 58 g, viðgjørt eftir somu reglum sum mál, ið verða ákærd av statsákæra.	**17.** § 58 f verður orðað soleiðis: "**§ 58 f.** Mál um brot eftir løgtingslógini verða viðgjørd sbrt. kapitlunum 91-93 og 95 í retsplejelov for Færøerne, uttan so at málið kann verða avgjørt við samtykki eftir § 58 g. Ásetingarnar í § 947, stk. 1 í retsplejelov for Færøerne verða ikki nýttar í málum um treytaða frádøming av koyrirættinum. *Stk. 2.* Dómsmenn viðvirka í málum, sbr. tó stk. 3: 1) Har talan er um hægri revsing enn 6 mánaðir ella meira, ella 2) har tað annars verður mett at hava serliga víðfevndan týdning fyri ákærda ella hevur serligan almennan áhuga. *Stk. 3.* Hóast ásetingarnar í stk. 2, viðvirka dómsmenn ikki í málum, sum: 1) Verða viðgjørd eftir ásetingunum í § 877 í retsplejelov for Færøerne, 2) viðvíkja rúsdrekkakoyring, sbrt. § 16 í løgtingslógini, 3) viðvíkja rúsevnakoyring, sbrt. § 15, stk. 1 í løgtingslógini, 4) viðvíkja koyring uttan førararætt, sbrt. § 18, stk. 1, § 18 a, stk. 1, ella § 18, stk. 3 í løgtingslógini, ella 5) viðvíkja koyring í frádømingartíðini, sbrt. § 58, stk. 5 í løgtingslógini. *Stk. 4.* Almennur verji verður tilnevndur eftir ásetingunum í §§ 738 og 740 í

	retsplejelov for Færøerne. Um ákærdi biður um tað, verður ein almennur verji skikkaður av Føroya Rætti: 1) Í málum har talan er um frádøming av koyrirættinum, koyriforboð ella frádøming av rættinum at koyra lítið prutl og har dómsmenn ikki viðvirka, og 2) í málum um rúsdrekkakoyring, sbrt. § 16, ella rúsevnakoyring, sbrt. § 15, stk. 1 í løgtingslógini. *Stk. 5.* Ákærdi verður vegleiddur um heimild til tilnevndan verja.”
§ 59 a. ... *Stk. 2-3.* ... *Stk. 4, nr. 1.* § 29 a, stk. 3, 1. pkt., § 29 a, stk. 4, § 29 b, stk. 2, § 29 d, stk. 1 og 2, § 31 a, stk. 1-3, § 31 b, stk. 1, § 31 d, stk. 1, § 31 e, § 42, stk. 4, § 42 a, stk. 6, § 42 b, stk. 4, 2. pkt., § 42 c, stk. 2 og § 43, stk. 4, seinasta pkt., Nr. 2-5. ... *Stk. 5.* ...	**18.** Í § 59 a, stk. 4, nr. 1 verður orðað soleiðis: “1) § 16 b, stk. 1, § 29 a, stk. 3, 1. pkt., § 29 a, stk. 4, § 29 b, stk. 2, § 29 d, stk. 1 og 2, § 31 a, stk. 1-3, § 31 b, stk. 1, § 31 d, stk. 1, § 31 e, § 42, stk. 4, § 42 a, stk. 6, § 42 b, stk. 4, 2. pkt., § 42 c, stk. 2 og § 43, stk. 4, 2. pkt.,”
§ 59 h. Um brot, sum er umfatað av § 59 a, stk. 1 ella 5 er gjørt innan fyri trý tey fyrstu árini eftir, at førarin fekk koyrirættindini fyrstu ferð, fær førarin koyriforboð í staðin fyri treytaða frádøming av koyrirættindunum. Tá koyriforboð er givið, verða koyrirættindini at koyra tey í § 59 nevndu akfør tikin aftur, til serlig koyrifrálæra er gjøgnumførd ella luttikið er í R/F-skeiði, sbr. § 18 d, stk. 1 og 2, og eftiransandi koyriroynd er staðin.	**19.** Í § 59 h, 2. pkt. verður “R/F-skeiði” broytt til: “skeiði um rúsdrekka, rúsevni og ferðslu, RRF-skeiði”.
Yvirskriftin yvir § 60 a: *Lítlar breytmotorsúkklur (pocketbikes)*	**20.** Yvirskriftin yvir § 60 a verður orðað soleiðis: *“Lítlar breytmotorsúkklur”*
	21. Aftan á § 60 a, men áðrenn yvirskriftina yvir § 61, verður sett: “*Annað lítið motordrivið akfar*

	§ 60 b. Tað er bannað at nýta onnur lítil motordrivin akfør á øki, sum løgtingslógin fevnir um. *Stk. 2.* Koyrir annað lítið motordrivið akfør á øki, sum løgtingslógin fevnir um, skal tað við brotinum nýtta akfar inndragast. *Stk. 3.* Annars eru reglurnar um inndrátt í revsilógini galdandi.”
Yvirskriftin yvir § 64 a: *“Skoðan”*	**22.** Yvirskriftin yvir § 64 a verður orðað soleiðis: “*Skoðan og umsiting av akfarsskrá*”
§ 64 a. Fyri skoðan í sambandi við skráseting og/ella góðkenning verður goldið: 1) Lastvognur, leguvognur, viðfestivognur, bulvognur ella bussur, tá akfarið hevur eina heildarvekt, ið er oman fyri 3.500 kg: kr. 550. 2) Annað akfar: kr. 350. *Stk. 2.* Hóast stk. 1 verður fyri umskoðan goldið kr. 100. *Stk. 3.* Um ikki verður møtt til ásetta skoðan ella umskoðan, og ikki er boðað frá í seinasta lagi sama dag fyri ásettu skoðanina ella umskoðanina, skal eyka gjald verða goldið, ið er sama upphædd sum árliga gjaldið fyri tíðarvísa skoðan, sbr. § 64 b, stk. 1. Hóast ásetingina í 1. pkt., skal ikki verða goldið, um fráveran er orsakað av sjúku, ið er váttað av lækna, ella um aðrar heilt serligar umstøður gera seg galdandi.	**23.** § 64 a verða orðað soleiðis: “**§ 64 a.** Fyri skoðan í sambandi við skráseting og góðkenning, ella góðkenning, verður goldið: 1) Lastvognur, leguvognur, viðfestivognur, bulvognur ella bussur, tá akfarið hevur eina heildarvekt, ið er oman fyri 3.500 kg: kr. 650. 2) Annað akfar: kr. 450. *Stk. 2.* Fyri umskoðan verður, hóast ásetingarnar í stk. 1, goldið: 1) Fyri akfør við heildarvekt, sum er í mesta lagi 3.500 kg: kr. 200. 2) Fyri akfør við heildarvekt, sum er yvir 3.500 kg: kr. 500. *Stk. 3.* Um ikki verður møtt til ásetta skoðan ella umskoðan, og ikki er boðað frá sama dag fyri ásettu skoðanina ella umskoðanina, skal eyka gjald verða goldið, ið er sama upphædd fyri árliga gjaldið fyri tíðarvissa skoðan og umsiting av akfarsskránni, sbrt. § 64 b, stk. 1. Hóast ásetingina í 1. pkt., skal ikki verða goldið, um fráveran er orsakað av sjúku, ella um aðrar heilt serligar umstøður gera seg galdandi.”
§ 64 b. Fyri tíðarvissa skoðan verður árliga goldið: 1) Motorsúkkla og stórt prutl: kr. 150. 2) Bilur við heildarvekt, sum í mesta lagi er 3.500 kg: kr. 250. 3) Bilur við heildarvekt, sum er yvir 3.500 kg: kr. 350.	**24.** § 64 b verður orðað soleiðis: “**§ 64 b.** Fyri tíðarvissa skoðan og umsiting av akfarsskránni verður árliga goldið: 1) Motorsúkkla og stórt prutl: kr. 250.

4) Leguvognur, viðfestivognur ella bulvognur við heildarvekt, sum er yvir 750 kg, men í mesta lagi er 3.500 kg: kr. 250. 5) Leguvognur, viðfestivognur ella bulvognur við heildarvekt, sum er yvir 3.500 kg: kr. 350. 6) Lendisakfar: kr. 250. *Stk. 2.* Fyri umskoðan verður, hóast ásetingarnar í stk. 1, goldið kr. 100. *Stk. 3.* Um ikki verður møtt til ásetta skoðan ella umskoðan, og ikki er boðað frá í seinasta lagi sama dag fyri ásettu skoðanina ella umskoðanina, skal eyka gjald verða goldið, ið er sama upphædd sum árliga gjaldið, sbr. stk. 1. Hóast ásetingina í 1. pkt., skal ikki verða goldið, um fráveran er orsakað av sjúku, ið er váttað av lækna, ella um aðrar heilt serligar umstøður gera seg galdandi.	2) Bilur við heildarvekt, sum í mesta lagi er 3.500 kg: kr. 350. 3) Bilur við heildarvekt, sum er yvir 3.500 kg: kr. 450. 4) Leguvognur, viðfestivognur ella bulvognur við heildarvekt, sum er yvir 750 kg, men í mesta lagi er 3.500 kg: kr. 350. 5) Leguvognur, viðfestivognur ella bulvognur við heildarvekt, sum er yvir 3.500 kg: kr. 450. 6) Lendisakfar: kr. 350. *Stk. 2.* Fyri umskoðan verður, hóast ásetingarnar í stk. 1, goldið: 1) Fyri akfør við heildarvekt, sum er í mesta lagi 3.500 kg: kr. 200. 2) Fyri akfør við heildarvekt, sum er yvir 3.500 kg: kr. 500. *Stk. 3.* Um ikki verður møtt til ásetta skoðan ella umskoðan, og ikki er boðað frá sama dag fyri ásettu skoðanina ella umskoðanina, skal eykagjald verða goldið, ið er sama upphædd fyri árliga gjaldið, sbrt. stk. 1. Hóast ásetingina í 1. pkt., skal ikki verða goldið, um fráveran er orsakað av sjúku, ella um aðrar heilt serligar umstøður gera seg galdandi.”
§ 64 c. ... *Stk. 2. ...* *Stk. 3.* Hóast stk. 1 og stk. 2 verður fyri umskoðan goldið kr. 100. *Stk. 4.* Um ikki verður møtt til ásetta skoðan ella umskoðan, og ikki er boðað frá í seinasta lagi sama dag fyri ásettu skoðanina ella umskoðanina, skal eyka gjald verða goldið, ið er sama upphædd sum gjaldið fyri umbidna skoðan, sbr. stk. 1. Hóast ásetingina í 1. pkt., skal ikki verða goldið, um fráveran er orsakað av sjúku, ið er váttað av lækna, ella um aðrar heilt serligar umstøður gera seg galdandi.	**25.** § 64 c, stk. 3 og 4 verða orðað soleiðis: “*Stk. 3.* Hóast stk. 1 og stk. 2 verður fyri umskoðan goldið: 1) Fyri akfør við heildarvekt, sum er í mesta lagi 3.500 kg: kr. 200. 2) Fyri akfør við heildarvekt, sum er yvir 3.500 kg: kr. 500. *Stk. 4.* Um ikki verður møtt til ásetta skoðan ella umskoðan, og ikki er boðað frá sama dag fyri ásettu skoðanina ella umskoðanina, skal eykagjald verða goldið, ið er sama upphædd, sum gjaldið fyri umbidna skoðan, sbrt. stk. 1. Hóast ásetingina í 1. pkt., skal ikki verða goldið, um fráveran er orsakað av sjúku, ella um aðrar heilt serligar umstøður gera seg galdandi.”
§ 64 d. Fyri endurrit av skrásetingarskjali ella skoðanarváttan verður goldið kr. 50. *Stk. 2. ...*	**26.** § 64 d, stk. 1 verður orðað soleiðis: “§ 64 d. Fyri endurrit av skrásetingarskjali ella skoðanarváttan verður goldið: kr. 150.”

	§ 2 Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.